Fótbóltsdómaraskeið:

Flest allar trioirnar vóru umboðaðar á fyrsta dómaraskeiðinum

Dómarafelagið skipaði fyri fótbóltsdómaraskeiðið í Havn um vikuskiftið. Um hálvthundrað dómarar luttóku

Í lógunum fyri dómarafelagið innan Fótbóltssamband Føroya, stendur m.a. at felagið skal taka sær av at útbúgva føroysku dómararnir.

Og fyrsta stig av hesi útbúgving byrjaði seinasta vikuskiftið.

Dómarafelagið hevði skipað fyri skeiðið fyri øllum dómaratriounum, ið døma í trimum teimum fremstu deildunum. Skeiðið, ið varð hildið í fundarhøllini í ÍSF-húsinum í Gundadali, byrjaði fríggjakvøldið og endaði sunnukvøldið.

Luttøkan var hampuliga góð — hóast tað tó vóru fýra dómaratrioir úr ymiskum felagum, ið als ikki vóru umboðaðar.

Umleið hálvthundrað av fótbóltsdómarum okkara høvdu tó leitað sær niðan í gundadal til hetta skeið — og óiva meta flest allir teirra, at tann tíð, ið teir nýttu til hetta, var ikki til fánýtis.

Danskur dómari skeiðleiðari

Leiðari á skeiðnum var danin Kurt Sørensen. Kurt Sørensen er kendur danskur dómari, ið sjálvur dømur m.a. dystir í 1. division í Danmark, og er hann harafturat eisini útbúgvin dómaraskeiðs-leiðari. Kurt Sørensen er umframt hetta eisini valdur formaður í fótbóltsdómarafelagnum á Fyn, Fyns Fotbolddommer-Union, FFU.

Teori og praktik

Á skeiðinum var bæði teoretisk og praktisk gjøgnumgongd av dómaraarbeiðinum.

Rokna varð við, at luttakararnir, ið jú allir skulu døma í vaksnamannadeildini, frammanundan skeiðinum høvdu hollan kunnleika til fótbóltslógirnar, og varð ti gjørt lítið av at undirvísa í hesum. Í staðin varð størri dentur lagdur á hvussu ein sum dómari eigur at stýra einum dysti.

At sita og tosa um hvussu ein eigur at gera eitt, og veruleikin kann vera heilt ein annar. Orsaka av hesum vóru eisini tveir fótbóltsdystir, ið skeiðluttakararnir dømdu, við á skránni. Leygardagin var dystur millum B36 og Streym í 4. deild, sum ein trio av skeiðluttakarum dømdi og sunnudagin dømdi skeiðleiðarin, Kurt Sørensen, dystin í 1. deild millum HB og LIF — sum lorvikingar vunnu við trimum málum móti ongum — meðan tveir av luttakarunum vóru linjuverjar.

Undan hesum dystum vórðu skeiðleiðararnir býttir í seks bólkar, ið so eygleiddu dystirnar og dómararnar og linjuverjarnar. Aftaná dystirnar varð so tosa um hvat ið var hent í dystunum, hvussu dómari hevði dømt, hvat hann kundi gjørt í ávísum førum o.s.fr.

Annars var skeiði í nógvum førum fyriskipa á tann hátt, at luttakararnir arbeiddi saman í bólkum.

Bert fyrsta stigið

Aftaná skeiðið hittu vit formannin og skrivaran í dómarafelagnum, Jean Dimon og Julius Vest.

Teir greiddu okkum frá, at hetta skeiðið bert var fyrsta stigið í royndum felagsins at loysa dómaratrupulleikarnar í Føroyum — at hækka stoðið millum dómararnar.

— Ætlanin er at fáa skeiðvirksemi í ein fastari karm framyvir, men enn vita vit ikki hvussu hetta kemur at verða. Vit hava tó fingið Kurt Sørensen at vera kontaktmann — sambindingarlið — millum Fótbóltssambandið og DFU, Dansk Fotbolddommer-Union, og hevur hann lovað at fáa okkum ymiskt tilfar til vegar og at hjálpa okkum, so nógv sum tað ber honum til, siga Jean og Julius.

— Vit meta, at hetta er ein gongd leið í royndunum at loysa teir trupuleikar, ið hava verið í samband við dømingina seinastu árini, og vit halda í hvussu er, at flest allir — fyri ikki at siga allir — skeiðluttakararnir mettu seg at hava fingið nógv burturúr hesum fyrsta skeiði okkara, endaðu Jean Dimon og Julius Vest.



Kurt Sørensen, ið leiddi skeiðið, er kendur dómari. Hann dømur m.a. í 1. division í Danmark, og er hann harafturat formaður í dómarafelagnum á Fyn, Fyns Fodbolddommer-Union, FFU



Bíðað í tvey ár

Nú eru um tvey ár síðan, at løgtingið samtykti at samskipa heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina. Og roknað hevur verið við, at skipanin fór at virka fyrsta dagin.

— Men nú má ásannast, at av eini ella aðrari grund er skipanin steðgað í einum ella øðrum liði í umsitingini antin her ella í Danmark, sigur Jóannes Dalsgaard.

Hann vísir á, at hetta kundi løgtingið og almenningurin fingið uppklárað, um fyrispurningurin hevði verið svaraður.

— Men samgongan ynskir sum vanligt, at løgtingið skal ikki fáa innlit í landsstýrisarbeiðið. Hetta er stórt spell, tí tað er sera átroðkandi at fáa skipanina at virka, sigur Jóannes Dalsgaard.

Eitt stórt framstig

Fyrispurningurin, sum Jóannes Dalsgaard ikki fekk loyvi at seta fram, er í tveimum:

1: Nær verður leiðarin fyri heilsu- og heimarøktarskipanini settur í starv?

2: Nær fer heilsu- og heimarøktarsystraskipanin at virka?

Í viðmerkingunum til fyrispurningin sigur løgtingsmaðurin:

»Í 1980 samtykti løgtingið at umskipa, økja og samskipa ta heilsu- og heimasjúkrarøkt sum í ávísan mun frammanundan hevði verið fyriskipað av kommunum og sjúkrakassum.

Hendan samskipan og broyting varð, tá hon fór at verða sett í verk, eitt stórt framstig í mun til tað tænastustøðið, ið var frammanundan.

Tað er royndur lutur, at nógv fólk, sum í dag liggja heima og mugu klára seg við heimahjálp ella við hjálp frá sínum skyldfólkum, hava stóran tørv á heimasjukrarøkt. Hetta er ein tørvur, sum tykist ver vaksandi og sum gerst alt meir átroðkandi, har eingi ella ov fá røktarheimspláss eru.

Eisini er tørvur á at fáa samskipan virksemið hjá smábarnaheilsusystrum og skúlaheilsusystrum, at fáa økt munandi um hetta virksemið og talið av starvsfólkum, soleiðis at øll børn í landinum kunnu koma undir hesa skipan.

Nú eru tvey ár gingin síðan nýskipanin við heilsu- og heimasjúkrasystrum varð samtykt á løgtingi, men enn er hon ikki farin at virka. Tað verður bíðað eftir hesi nýskipan við otolni og havi eg tí hildið tað verið beint at spyrja landsstýrismannin í heilsumálum henda fyrispurning«.

KJARTAN DALSGAARD
TRYGGINGAR UMBOÐS SKVA
TLF 15222



Jean Dimon og Julius Vest, ið eru ávikavist formaður og skrivari í dómarafelagnum

Framhald av síðu 1

inum var, at freistin fyri at leggja mál fyri tingið var úti 19. mars.

— Við hesi avgerðini hevur landsstýrissam-